# Álit og Jóannes Eidesgaard

ÁKI ANDREASEN



**Fyrrverandi løgmaður og núverandi fíggjarmálaráðharrin Jóannes Eidesgaard, hevur síðan CHE slitnaði borðreitt við somu endurtøkuni rungaði, meðan og eftir at Javnaðarflokkurin hevði landsfund í Klaksvík.**

**Dropin og glasið**
Hann hevur trúliga og áhaldandi sagt øllum føroyingum og umheiminum, at hann misti álitið á formanni Tjóðveldis. Við einum meira ella minni skemtiligum máli um eina skrivstovu, nýtti Jóannes Eidesgaard tiltikna "dropan", sum fekk bikarið at flóta yvir.

Eftirsum hann vil gera Høgna Hoydal til skurk, og ein óálítandi mann, haldi eg at tað vildi verið hóskiligt at greitt frá, hvat tað er sum annars hevur fylt "álitisglasið" hjá Eidesgaard....hvat var tað sum í samstarvinum millum Hoydal og Eidesgaard máaði støði undan tí "áliti", sum hevur verið undanførslan hjá formanninum í Føroya Javnaðarflokki...?

**Eljustríð í Javnaðarflokkinum**
Øll vita, at tað var eitt eljustríð í Javnaðarflokkinum – tí hvørki tingmanning ella bakland hevði rygg til at seta í verk tað, sum stóð í CHE skjalinum, sjálvt um tað sambært teimum sjálvum var á tremur við javnaðarpolitikki.....

Krøvini til CHE samgonguna vóru ikki smá, á fyrsta sinnið var minnilutasamgonga roynd, og tað krevur politiskt hegni og handverk, og har gekk Javnaðarflokkurin eisini í ov smáum skóm; oddvitanir í Javnaðarflokkinum høvdu nokk við at avsanna tíðindaskriv, sum komu frá einum tingbólki í upployns, og stútt og støðugt var órógv og atfinningar frá javnaðarstuðlum.

**Góð ráð dýr**
Topparnir í Javnaðarflokkinum vóru í dýrastu neyð, Eidesgaard royndi at halda upp á sínar egnu, men so gleppur – og í staðin at fara til sínar samstarvsflokkar og leggja kortini á borðið, so leggja tey í Javnaðarflokkinum ráð saman um at royna ABC og turka grundgevingina av upp á CHE samgonguna – og serliga formannin í Tjóðveldinum.

Er nakað álitisbrot, er nakað mannminkandi og skitligt arbeiðslag, so er tað framferðarhátturin hjá Føroya Javnaðarflokki fyri at sleppa burtur úr CHE samstarvinum.

**Vinstrarákið.....**
Gjøgnumgangandi á landsfundinum hjá Føroya Javnaðaðarflokki vóru skuldsetingarnar og runublaking móti Tjóðveldinum, og so tosaðu tey um eina alheims "vinstrasnaring" og setti so teirra egna flokk í tann samanhangin, hetta verður gjørt púra ósmæðið, eftir at Javnaðarflokkurin kolldømdi eina vinstrasamgongu, har veruliga grundgevingin var, at flokkurin ikki hevði politiskan rygg, og enntá valdi at gera sínar samstarvsfelagar til syndabukk.

Javnaðarflokkurin valdi ikki bara at slíta CHE, men at kasta saman aftur í eina ABC-samgongu, sum við ódámligum høgrapolitikki undanfarnu 4 árini hevur tømt kassarnar, latið skattalættar til tey vælbjargaðu, yvirhitað búskapin, ætlaði at avreiða øll fiskirættindi endaliga - og enntá gjørt serligar skattafrádráttir fyri partabrævaspekulasjón.

Skil tað, hvørið skilja vil.

# Ótespilig útspilling av uttanríkisráðharranum

HØGNI HOYDAL



Ein, ið nevnir seg Rolf Guttesen, hevur í Sosialinum 19. november, eitt grovt persónligt álop á uttanríkisráðharran, Jørgin Niclasen, við niðrandi útspilling og ákærum.

Haldi meg minnast, at sami lesarabrævskrivari higartil stútt og støðugt, ár undan ári, hevur nýtt Sosialin og stundum onnur bløð til at spilla navngivin og ónavngivin tjóðveldisfólk út, umframt onnur hampafólk – og eisini fólk, ið eru farin higani av fold. Atvoldin til ótespiligu útspillingarnar er eftir øllum at døma, at hesi fólk hava stríðst fyri málum, sum Rolf Guttesen ikki tekur undir við.

Og nú fær Jørgin Niclasen so av somu skuffu. Hann (og óbeinleiðis kona hansara) verða persónliga spjaldurssett og niðurgjørd, tí tey umboða Føroyar á eini almennari vitjan í Íslandi. Jørgin Niclasen verður lagdur undir landsskaðiligt virksemi, og samstundis verður íslendska tjóðin niðurgjørd.

Og hví? Tí Jørgin Niclasen á fundi hevur fingið eitt tilboð frá íslendska uttanríkisráðharranum, Ingibjørg Sólrún Gísladóttir, um at Føroyar kunnu samstarva við Ísland um hølir á sendistovum hjá Íslandi í eitt nú Geneve og Moskva.

Nú er hetta í fyrsta lagi onki nýtt. Sama tilboð hevur íslendska stjórnin givið áður. Og Ísland hevur í fleiri ár samstarvað við og viett tænastur til við føroyskar myndugleikar um altjóða mál, tá tørvur er á tí.

Tað snýr seg rætt og slætt um, at lond samstarva um sendistovuhølir og ymiskar tænastur, eins og Norðurlond gera í stóran mun. Tað snýr seg ikki um, at Føroyar skulu leggja seg undir og gerast partur av Íslandi ella skulu flagga við íslendskum flaggi, ella fylgja boðum frá íslendskum sendiharrum, soleiðis sum talan er um á donskum sendistovum.

Í øðrum lagi er tað ótrúliga snævurskygt og heimastýrisligt at harta ein uttanríkisráðharra og eina aðra tjóð, tí ein útrætt hond og eitt tilboð verður endurgivið á eini almennari vitjan.

Rolf Guttesen skírir tað sum vanligt eisini "nationalismu", tá talan er um samstarv við Ísland. Men tann einasta "nationalisman", ið ger seg galdandi her, er ein avoldað donsk nationalisma, sum Rolf Guttesen umboðar. Ein nationalisma, sum sigur, at tað finst bara ein vegur út í heim og tað er gjøgnum Danmark. Og ein nationalisma, sum brúkar ringastu ókvæmisorð móti teimum ið halda, at ein heimur er uttan fyri danska ríkið og at vit skulu samstarva við øll heimsins lond.

Hervið taki eg frástøðu frá hesi útspilling av okkara uttanríkisráðharra og av íslendsku tjóðini. Og undirist enn sum áður á, at blaðstjórar glaðbeintir prenta persónligar útspillingar og bakbit.

# Billy Graham - Psykologiskur nervøsitetur

SÍMUN PAULI JACOBSEN



Ein av heimsins leiðandi matematikkarum leitaði meg upp persónliga á gistingarhúsi mínum fyri stuttum. Tað merktist týðuliga á honum, at vektin av teimum persónligu trupulleikunum var vorðin so tung, at hann stóð á markinum fyri einum samanbroti. Lívsins tónar vóru vornir ov møtumiklir. Hann var í vanda fyri at vera ein av teimum, sum fær hagtølini fyri mentalar sjúkur av vaksa.

Tann intellektuella støðan, sum tað nýmótans menniskja er í, er eitt paradoks. Teknisk sæð hava vit skapað vísingalig mirakul, men vit makta ikki at nøkta okkara djúpasta tørv. Vit hava fingið hjól undir fótunum, men bangilsi og stúran í hjartað. Vit eru før fyri at liva longri, men ikki betri. Vit liva meira komfortabult enn áður, men eru ikki so nøgd, sum vit áður vóru.

Sambært almennari heilsurapport í USA, so eru tað átta milliónir í hesum landi, sum líða undir einum ella øðrum slag av mentalum sjúkum. Ein millión av hesum fáa hvørt ár viðgerð á sjúkrahúsum í USA. Yvir 50% av landsins sjúkrahússongum eru upptiknar av fólki, sum líða av mentalum ella psykiskum sjúkum. eitt av hvørjum tíggju børnum, sum í dag verða fødd, vil vera at finna á einum sjúkrahúsi við mentalum sjúkum eina ella aðru ferð í lívi teirra.

Mong av heimsins mentalu sjúku eru í veruleikanum sjúk í hjarta og sál. Sjúkdómur teirra viðvíkir ikki skaða á heilanum. Fólk fara ikki frá vitinum, tá tey fáa nervøst samanbrot. Tey missa seg sjálvan. Tey verða burtur í einum heimi, tey sjálv skapa sær, til tess at sleppa undan tí veruliga heiminum. Tað mest órógvandi í samband við mentalar og følilsisvekjandi líðingar er, at tað eru so mong menniskju í okkara tíð, sum líða undir hesum. Í eini grein stutt síðani varð dagsins ungdómur kallaður »tað plágaða ættarliðið«. Har varð nevnt millum annað: »Á universitetinum í Pennsylvania biðja 20% av studentunum um hjáp frá tí mentalu heilsutænastuni«. »Við Harvard universitetið konsultera 25% av studentunum ein psykiatrikara ella sosialarbeiðara, »Ein uppgáva, sum nýliga varð kend, gongur út uppá, at 600 psykiatrikarar, sum arbeiða á ymiskum collegum, siga, at 15% av studentunum í skúlum teirra søkja psykiatriska hjálp, meðan heili 30% áttu at gjørt tað.

**Flýggjan**
Tað eru milliónir, sum eru upptikin av at jarða høvdið í sandinum í eini roynd at billa sær sjálvum inn, at tað, sum hendir í okkara tíð, ikki er veruligt. Í ráðaloysi royna tey at sleppa undan nútímans harða trýsti.

Flýggjan er í sjálvum sær eingin mental sjúka, men ein roynd at sleppa undn veruleikanum. Tað er nakað, sum kann gerast ein vani, tá ein stendur yvir fyri nøkrum, ein ikki hevur hug til. Flýggjanin kann vera á ymsan hátt. Tann troytta húsmóðurin tekur sær ein shoppingtúr, meðan onnur kanska søkja sær skjól í eini kærleikansafferu. Ein av mest vanligu háttum at flýggja, er at fara til alkoholið. Hetta seinasta er vorðin ein tjóðskaparlig katastrofa.

Hvørja viku taka vit ímóti túsundum av brøvum á skrivstovu okkara í Menneapolis, og meira enn helmingurin av hesum brøvum siga frá trupulleikum í heiminum. Helmingurin av hesum trupulleikum viðvíkir alkoholmisnýtslu. Drykkjuskapur er vorðin ein av okkara størstu sosialu trupulleikum. Í veruleikanum er tað eitt úrslit av roynd at sleppa undan lívsins ábyrgd - tann beiski veruleikin. »Hvørja ferð maður mín og eg vóru ósamd, fór hann í barrina á horninum«, skrivar ein kvinna frá Iowa.

Tað kundi verið skrivað tjúkkar bøkur um narkotika og stimulerandi evnir. Hvørt einasta kvøld verður svølgt milliónir av tablettum fyri at menniskju kunnu fáa sovið. Milliónir av tablettum skulu halda okkum rólig um dagin. Milliónir av tablettum skulu vekja okkum um morgunin. Bíblian ávarar okkum og sigur, at hesar flýggjanarroyndir frá veruleikanum ikki geva nøgdsemi, sum varir.

**Angist**
Framtíðar søgumenn fara kanska at umtala hesa tíð sum »Angistsins tíðarøld«. Sjálvt um vit á mangan hátt ikki hava so nógv at vera bangin yvir, sum fyrrverandi ættarlið, so eru vit hóast alt bangin. Sjálvt um vit hava tað lættari enn forfedrar okkara, so er hóast tað meira, sum tyngir okkum. Sjálvt um vit hava minni orsøk til at vera bangin, so eru vit meira bangin enn nakrantíð. Tað, sum sermerkti forfedrar okkara, vóru harðhúðaðar arbeiðshendur, meðan sermerki við nýmótans menniskja er ein rukkut panna.

Forfedrarnir klagaðu um, at teir vóru útslitnir vegna fysiskt arbeiði, meðan tað, sum plágar okkum er, at vit verða uppslitin av yvirfølsomheit. Nógv av hesum hongur saman við, at vit ikki síggja lívsins virði á sama hátt. Fyri hundrað árum síðani hugsaðu fólk meira um sítt andaliga lív. Í dag er ein mest upptikin av tí fysisku vælferðini. Skarar av menniskjum trúgva faktiskt, at um vit geva einum menniskja nokk av mati, hús, klæðir, útbúgving og ávís frítíðararbeiði, so røkkur ein UTOPIA.

Psykoanalytikarin, Erich Fromm heldur, at tað nýmótans lívið broytir menniskjuni til at vera bangin, kærleikarleysir skuggar. Hann sigur: »Teir flestu amerikanarar trúgva, at samfelag okkara við øllum eydnusomu, stuttleikahugaðu og jetreisandi menniskjum skapar eydnusom viðurskifti fyri tey flestu. Eg haldi tað øvugta, nevniliga, at tað lív vit liva førir til bangilsi, hjálparloysi, ja møguliga til upployning av mentan okkara. Er tað møguligt, at dreymur okkara um materiella vælferð, sum skuldu føra eitt eydnusamt lív við sær, einans er ein dreymur?«

***Kelda:** Billy Graham. Verden i Flammer 1971. Umsett hevur Símun Pauli Jacobsen, Vestmanna*